## DAGSINS MEINING

# Eitt summartekin

Komandi vikuskifti verður Norðoyastevna, og hendan stevna er sum kunnugt fyrsta summarstevnan. Øll summarstevnumyndin er við at broytast. Vit hava fingið festivalarnar umframt eina røða av størri og smærri bygda- og býartiltøkum. Øll hesi tiltøk, stevnur, festivalar, bygda- og økisstevnur hava sjálvsagt eina sínamillum ávirkan tí marknaðurin er so at siga avmarkaður. Tað verður tí spennandi at síggja, hvussu myndin fer at síggja út um nøkur ár. Eitt er vist og tað er, at festivalarnir eru komnir fyri at vera, og tað er bert at fegnast um. Festivalarnir eru eitt nýtt og kærkomið tilboð til ung og gomul.

Í ár er so fyrstu ferð at koyrandi verður til Norðoyastevnu. Fortreytirnar eru fullkomuliga broyttar við Norðoyatunnlinum, og tí er sera spennandi at vita, hvussu henda nýggja, henta og sera skjóta farleiðin fer at ávirka luttøkuna á Norðoyastevnu. Vit halda okkum tó vita, at tunnilin fer at gera, at nógv meira fólk enn vanligt fer at vera á Norðoyastevnu. Ivaleyst fara mong, sum enn ikki hava roynt tunnilin at nýta høvið og sostatt fáa tvey upplivilsi í einum: tunnil og stevnu. Vit kundu lagt afturat, at Klaksvík í sjalvum sær veruliga er verd at vitja. Her eru ómetaliga nógv áhugaverd og spennandi tilboð. Hartil kemur so ein sera fjølbroytt og dygdargóð stevnuskrá, so alt skuldi bent á eina vælvitjaða Norðoyastevnu.

Ítróttin hevur altíð sett sín dám á stevnurnar. Stevnurnar eru fram um alt karmar um tjóðarítrótt okkara, kappróðurin. Kappróðurin fyllir nógv í huga føroyinga, og tí líta vit øll fram til at kappróðraráðrið,ið nú byrjar av álvara. Ítróttin sum heild hevur stóran mentanarligan týdning eins og hon hevur týdning fyri fólkaheilsuna. Tað vildi sjálvsagt verið skeivt at gjørt mun á ítróttagreinum, tí allar hava tær týdning hvør í sínum lagi. Hinvegin skerst ikki burt, at kappróðurin stendur hjørtum føroyinga sera nær. Tað er nakað sermerkt við kappróðrinum, og kemur hetta valeyst av, at vit í roynd og veru altíð hava havt hesa ítróttagrein. Í gomul døgum var hon bara ein partur av gerandisdegnum, tí róð var mangan kapp á útróðri ella í grind. Summarstevnurnar hava avgerandi týdning fyri kappróðurin og tí vóna vit at teimum verður lív laga í tí kapping, tær nú hava fingið. Hetta merkir eisini, at fyrireikararnir verða noyddir at hugsa um nýggjar formar og nýggj tilboð. Tó verður kappróðurin ivaleyst eisini framyvir hjartatátturin í stevnuni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Miðbýarvíðsjónir í Tórshavn



*Í viðmerkingini niðanfyri ber Eyðun á Borg, lærari á Argjum, fram uppskot um at endurbyggja Áarstovu í Gongini í Havn, har skaldabrøðurnir, Hans Andreas og Janus Djurhuus vuksu upp. Myndirnar sýna Áarvegin, Havnará og Áarstovu*



*Mynd tikin niðan gjøgnum Havnará. Har áin er á myndini, er nú vegurin millum Vertshúsið og Café Nátúr, har ferðslan gongur omaneftir. Áarstova stóð á økinum oman fyri Vertshúsið, niðan fyri Bringsnargøtu*



*Áarstova. Niðanfyri hómast Vertshúsið - har handlin Delta heldur til í dag*



*Janus Djurhuus og bróðirin, Hans Andreas vuksu upp í Áarstovu*



**EYÐUN Á BORG**
Á Borg á Argjum

**1) Havnará fram í dagsins ljós!**

**2) Áarstova endursmíðað!**

**3) Standmynd av Janusi Djurhuus!**

Í hesum Stórutjarnar- og Skálatraðartíðum hava vit eisini víðar sjónir á Áarvegnum í Havn!

1) Havnará sleppur fram aftur í dagsins ljós (fram við ríkisumboðskvinnugar ðinum)!

2) ÁARSTOVA (barnaheimið hjá Janusi og Hans Andriasi) verður smíðað aftur á upprunaliga staðnum yvir av/vestan fyri Cafè Natúr! Um neyðugt, kann hon gerast eitt sindur minni, enn hon upprunaliga var.

3) STANDMYND av Janusi, meginskaldinum, kundi staðið uttan fyri Áarstovu! Við miðbýarvíðsjónum

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.